# VÍF funnið venjara

Besta mansliðið hjá VÍF stóð uttan venjara, eftir at síðsti dysturin farna kappingarár var spældur. Síðani hava vestmenningar leitað eftir nýggjum venjara, og nú hava tey funnið mannin, sum skal taka við starvinum. Danin, Morten Hust Petersen, verður nýggjur venjari hjá felagnum. Morten Hust Petersen hevur tikið ímóti avbjóðingini at venja besta mansliðið, har hann eisini skal syrgja fyri venjingarlegunum. Harafturat skal hann hjálpa til við venjingunum hjá 1. deild og unglingum og virka sum ráðgevi fyri aðrar venjarar í felagnum. Morten Hust Petersen hevur m.a. vant landsliðið hjá bæði Ný Sælandi og Mongolia umframt fleiri ungdómslið í ýmsum donskum feløgum.



# Guttorm vann renningina

Guttormur Sørensen var fyrsti rennarin um málið, tá norðoyastevnurenningin var á skránni leygardagin. Fleiri enn 100 luttakarar vóru til renningina, harav 20 vóru í vaksna bólkinum. Og talan var um sannførandi sigur hjá Guttorm, sum við 15.59 minuttir gjørdist fyrsti rennarin, sum fór undir 16 minuttir á teininum. Næstir Guttormi vóru Sam Vang og Símun Joensen.

# Danir skammast

**Enn er ikki greitt, hvør revsingin verður, eftir at EIN áskoðari oyðilegði positivu myndina, sum donsku áskoðararnir hava teknað seinastu fjórðings øldina**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Michael Gravgaard megnaði akkurát at leggja seg ímillum, so illi áskoðarin ikki fekk langað til týska dómaran, Herbert Fandel, tá hesin hevði dømt brotsspark til Svøríki*

*Mynd: Polfoto/AP*

Miðlarnir ivaðust kanska, hvør var størra klovnin. Christian Poulsen, sum gav svimum brotsspark og fekk sær sjálvum reytt kort, ella áskoðarin, sum legðist eftir dómaranum.

Úrslitið var tó púrasta greitt. Hendingin tveir minuttir fyri leiklok fullkomuliga oyðilegði eitt fantastiskt fótbóltskvøld í Parkini, har danir vóru píndir gjøgnum alt kensluregistari.

Dysturin var ikki meira enn hálvan tíma gamal, tá sviar høvdu skotið seg upp á 3-0, og ein fullkomin eyðmýking tóktist liggja fyri framman hjá dønum.

Dysturin var tó langt ífrá liðugur, tí við málum frá Aggen, Tomasson og Leon Andreasen fekk Danmark strítt seg upp á javnt. Tomasson hevði enntá møguleika at leggja vertirnar á odda, áðrenn alt endaði í ruðuleika.

Fyrst misti Christian Poulsen fullkomuliga høvdið, tá hann langaði nevan í búkin á mótstpælara. Dómarin sá einki, men tað gjørdi linjuverjin, og sum rætt var, so gjørdi hann vart við hetta. Reytt kort til Poulsen og brotsspark til sviar var rættvísi dómurin. Ein av áskoðarunum sá tó lítið rættvísi í hesum. Uttan at nakar varnaðist smoygdi hann sær inn á vøllin, og var tað ikki fyri Michael Gravgaard, hevði dómarin fingið ein ordiligan frammaná.

Dysturin varð avbrotin, og nú er tað upp til UEFA at gera av, hvør revsingin til danir skal verða. Lítil ivi tykist vera um, at danir verða dømdir at tapa dystin, og so er spurningurin, hvørt talan eisini verður um aðra revsing. Og hvussu hørð hendan verður.

Beint eftir dystin kom Christian Poulsen við eini umbering til donsku tjóðina fyri sín atburð á vøllinum, og illi áskoðarin hevur eisini verið frammi við síni umbering. Men tær tykist nú kortini ikki heilt so nógv verdar í Danmark í hesum døgum.

### Ísland heilkiksaði

Fleiri aðrir dystir vóru spældir kring Europa leygardagin. Við føroyskum eygum er helst serliga áhugavert, at grannar okkara úr Íslandi heilkiksaðu, tá teir á heimavølli bert megnaðu 1-1 javnleik móti Liktenstein. Og tað smakkar helst illa hjá Íslendingum, at teir sum so ikki høvdu uppiborið betri.

Finnland tapti á heimavølli 2-0 fyri Serbia, og normenn vunnu tryggan 4-0 sigur á Malta. Í okkara bólki vann Litava á heimavølli 1-0 móti Georgia, samstundis sum Frakland vann 2-0 á heimavølli móti Ukraina.

Mikukvøldið spælir Italia í Litava, meðan Frakland hevur heimavøll móti Georgia.

# Fleiri met í Lyngby

Fimm av teimum sjey íðkarnum, sum umboða Føroyar í frælsum ítrótti á oyggjaleikunum á Rhodos í summar, hava luttikið í Lyngby Games um vikuskiftið. Í 1500 m. renning fyri kvinnur rann Bjørk Herup Olsen, við tíðini 4 min. 55 sek., sum er nýtt føroyskt met . Tað er fyrstu ferð, at ein føroysk kvinna rennur 1500 metrar undir 5 min. Randi Kúrberg setti tvey føroyskt met, tá hon kastaði spjótið 36,70 m. og hamarin 37,42 m. Rógvi Højgaard setti føroyskt met í spjótkasti við góðum trimum metrum, tá ið hann kastaði spjótið 57,45 m. Jóan Karl Joensen setti persónligt met, tá ið hann á fyrsta sinni rann 800 m. undir 2 minuttir, tíðin varð 1,59,66 min. Heri Ziska, luttók í hamarkasti, har hann kastaði 41,26 m., og klingruvarpi har hann kastaði 42,56 m.

Hini bæði, sum umboða Føroyar á Rhodos eru Guttorm Sørensen, sum vann 5 km. renning á Norðoyastevnu við tíðini 15 min. og 59 sek., og Rigmor N. Arge, sum setti nýtt føroyskt met á marathon teininum herfyri .



*Randi Kúrberg setti nýggj met í bæði spjótkasti og hamarkasti*

# Mikkjal avgreiddi passini

**Onkur av italsku gestunum mundi fingið trupulleikar við passinum. Og teir vórðu bilsnir, tá tað var ein av føroysku spælarunum, sum kundi hjálpa**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ofta gera útlendskir miðlar nógv burturúr, at føroysku spælararnir bert eru glaðir amatørar. Ein av teimum stuttligu søgunum av slagnum kom, tá italska ferðalagið var í ferð við at rigga seg til Føroya-ferðina.

- Ein av ferðaleiðarunum hjá teimum var stinnur í enskum, og hann ringdi á politistøðina at vita, hvussu teir skuldu bera seg at. Trupulleikin var, at passið hjá einum spælari hevði minni enn tríggjar mánaðir eftir, og tá so er, so kanst tú ikki ferðast.

- Vit fingu so greitt málið, og tá hetta var gjørt, spurdi hann, um eg ætlaði mær niðan at hyggja eftir dystinum leygarkvøldið. So tú kanst ætlað, at hann gjørdist bilsin, tá eg svaraði honum: Nei – eg skal spæla við! Men hann trúið mær kortini, og spurdi meg, hvat nummar eg var. Og tað vísti seg so eisini, at hann skuldi sita undir liðini á teirra nummar átta, sum er Gattuso, í flogfarinum. So vit fingu okkum eitt fínt prát um veður og vind, sigur Mikkjal Thomassen um hendingina, sum helst fekk fleiri smíl fram. Bæði á politistøðini og hjá italsku gestunum.



*Italski ferðaleiðarin varð púrasta paff, tá hann fekk at vita, at politisturin eisini skuldi spæla við á Tórsvølli*

*Mynd: Álvur Haraldsen*